# Góðafoss á land í Noreg



**17**
**túsund tons**

Íslendska farmaskipið Goðafoss, sum felagið Eimskip eigur, sigldi í kvøld á eitt riv við oynna Hvaler í Østfold nakað sunnan fyri Oslo. Eitt skip hjá norsku myndugleikunum er

á staðnum, og skiparin segði við NRK í kvøld, at Goðafoss hevur slagsíðu, og at fitt av olju er á sjónum. Veðrið er gott á leiðini.

Norska bjargingartænastan sigur, at umleið 800 tons av olju eru í íslendska skipinum, og at olja rennur úr tveimum tangum miðskips, sum taka 250 tons hvør. Sambært íslendsku fjølmiðlunum var Goðafoss á veg úr Helsingborg í Svøríki til Frederikstad í Noregi, tá óhappið hendi. 14 mans eru við skipinum, og eingin teirra fekk mein av hendingini.

Goðafoss er 165 metrar langt og merkt 17.000 tons. Skipið er bygt í 1995. Goðafoss er bingjuskip, og nú skipið fór á land, hevði tað 493 bingjur umborð.



*– Høvdu vit kunna lært nakað av toleransuni, sum vit hava fyri tí ófødda barninum og brúkt tað til dømis yvir fyri teimum livandi, millum annað fólkum, sum eru samkynd ella aðrar minnilutabólkar, sum kanska ikki altíð hava tað so øðiliga nemt í Føroyum, so hevði Føroyar verið eitt enn og betri stað at búð í.*

*Katrin Kallsberg, lækni í »Fólksins rødd«*



# Próvtalsstigin kemur stigvíst

**PRÓVDØMING Næsta skúlaár fer fólkaskúlin at taa nýggja sjey tala stigan í nýtslu**

Randi Jacobsen

Í Danmark 13-próvtalsstigin fyri langari tíð síðan skiftur út við ein nýggjan stiga, har 12 er hægsta próvtal. Hesin stig verður nevndur sjey talastigin, tí á honum eru sjey ymisk próvtøl.

Leingin hevur verið arbeitt við at seta hendapróvtalsstiga í gildi í Føroyum, og nú er greitt, at stigin verður settur í gildi næsta skúlaár, men tað verður bara fyri fólkaskúlan og onkrar vinnuskúlar. Orsøkin til, at hægri skúlarnir mugu bíða, er, at nýggj námsætlan skal setast í gildi samstundis.

Væntandi fáa hægri skúlarnir sjey tala stigan í 2012.

# ArtiCon dýpa havn í Hetlandi

**NÝGGJUR MARKNAÐUR Hetland kann gerast ein nýggjur marknaður hjá føroyskum fyritøkum**

Jan Müller

Føroya Tele er longu komið inn á marknaðin við sínum tænastum, og nú fylgir byggifyritøkan Articon eftir. Í báðum førum er talan um virksemi, ið hevur tilknýti til mennandi oljuvinnuna.

Byggifyritøkan Articon hevur fingið ein sáttmála í Hetlandi. Hetta veit heimasíðan Shetland News at siga frá. Talan er um at dýpa havnina í Scalloway fyri at skapa betri umstøður hjá eitt nú veitingarskipum í oljuvinnuni vestan fyri Hetland at leggja at har. Talan er um ein sáttmála upp á umleið 27 mill. kr. Niclas Joensen, fíggjarleiðari hjá Articon sigur við Dimmalætting, at sáttmálin er eitt stig á leiðini út á byggimarknaðin í útlandinum. Arbeiðið byrjar í apríl-mai og heldur fram árið út sigur fíggjarleiðarin við blaðið.

Robert Sinclair, sum starvast hjá hetlendsku myndugleikunum, sigur sambært Shetland News, at sáttmálin við føroysku fyritøkuna hevur stóran týdning bæði fyri Scalloway og fyri Hetland. Við hesum siparar hann m.a. til nógva oljuvirksemið, sum hevur tikið seg upp og fer at mennast serstakliga vestan fyri Hetland. Útbygging av bæði olju- og gasskeldum gevur eisini nógvar møguleikar fyri virksemi í Hetlandi, og her hava atløgupláss sum tað í Scalloway stóran týdning.

Articon er ikki fyrsta føroyska fyritøkan, sum hevur fingið annað beinið inn á hetlendska marknaðin, tá tað ræður um at veita tænastur, sum hava við menning av oljuvinnuni at gera. Føroya Tele hevur longu nógv virksemi bæði til havs og á landi í Hetlandi. Hetta eru teletænastur, ið eru knýttar at kaðalinum Føroya Tele hevur lagt millum lond.

Áhugavert verður at fylgja við, í hvønn mun føroyskt vinnulív í framtíðini fer at vera partur av útbyggingum í Hetlandi, her ikki minst innan oljuvinnuna. Í løtuni verða bygdar íbúðir í Sullom Voe, ið skulu hýsa umleið 800 fólkum, ið skulu byggja ein nýggjan gassterminal í økinum. Nógv fólk er komið uttanífrá at arbeiða. Spurningurin er so, nær føroyingar eisini fara at síggja og troyta møguleikan fyri at vera við í slíkum útbyggingum. Sum er starvast nógvir føroyingar í Noregi, har menningin av oljuvinnuni gevur nógv nýggj arbeiðspláss.



*Umboð fyri ArtiCon saman við umboðum fyri hetlendskar myndugleikar, eitt nú løgmaður í Hetlandi í miðjuni fremst, eftir at avtalan varð undirskrivað herfyri*

*Mynd ArtiCon*

jan@sosialurin.fo